## Taliban-leiðari tikin

New York Times skrivar í dag, at tann hernaðarligi leiðarin hjá Taliban, Mullah Abdul Ghani Baradar, er tikin til fanga í Pakistan. Sambært blaðnum var tað samstarv millum amerikanararnar og fregnartænastuna í Pakistan, sum førdi til handtøkuna. Amerikanskir talsmenn siga við New York Times, at Abdul Ghani Baradar er tann týdningarmesti Taliban-leiðarin, sum er tikin síðani innrásina í Afghanistan í 2001. Ein talsmaður fyri Taliban avsannar hinvegin, at Baradar er tikin. Sambært talsmanninum er leiðarin staddur í Afghanistan.



## Ímóti at hjálpa grikkum

Hóast leiðslan í ES hevur sagt, at samveldið er til reiðar at bjarga Grikkalandi undan húsagangi, tykist samhugurin við grikkum ikki vera líka stórur allastaðni í samveldinum. Í London sigur bretski fíggjarmálaráðharrin, Alastair Darling, at bretar hava ongan hug at hjálpa grikkum burtur úr kreppuni, og í Týsklandi sigur talsmaðurin hjá fíggjarmálaráðnum, Michael Offer, at talan verður ikki um at stovna nakran grunn, sum skal hjálpa Grikkalandi. Ein meiningakanning í Týsklandi vísir, at nógv teir flestu týskararnir eru ímóti, at Týskland skal hjálpa Grikkalandi.

# Vilja fáa lív aftur í 173 deyðar milliónir

**Ætlanin er nú at peningurin, sum stendur á kontu hjá festum kring landið nú skal koyrast í eina felags pulju, sum skal koma øllum landbúnaðinum til góðar**

LANDBÚNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú skal peningurin, sum festini kring landið eiga, koma øllum landbúnaðinum til góðar*

*Savnsmynd*

Ætlanin er er nú at broyta landbúnaðarskipanina soleiðis, at tær 173 milliónirnar sum standa á kontum hjá festum runt um í landinum, kunnu koma øllum landbúnaðinum til góðar.

Hetta fegnast Anna Rubeksen, forkvinna í Bóndafelag Føroya um.

Bóndafelagið hevur fingið uppskotið frá Fiskimálaráðnum til hoyringar og fer nú at gera sína viðmerkingar til málið.

Men tað er greitt, at sum heild tekur bóndafelagið væl ímóti broytingunum.

Sum støðan er nú, hevur hvørt festi sína kontu, har peningur verður settur inn á, tá ið tikið verður burtur av jørðini til byggilendi, vegir, grótbrot, ella hvat tað skal vera.

Men peningurin á kontuni kann bara brúkast til at skapa varandi virði á tí ávísa festinum, eitt nú til at byggja hoyggjhús, fjós ella annað fyri.

Og festarin skal undir øllum umstøðum betala helvtina sjálvur, tí hann kann bara fáa 50% av kostnaðinum av festikontuni.

Tilsamans standa einar 173 milliónir krónur á festikontum hjá festum kring landið, men sum støðan er nú, er skipanin so stirvin, at allur hesin peningurin er mest sum steindeyður.

Ein orsøk til hetta er, at tað eru so ómetaliga fá, sum byggja nakað á festunum.

- Nú er ætlanin at broyta skipanina so, at ein tíggjundapartur verður tikin av hvørjari festikontu um árið og settur inn á eina felagskontu.

Tað merkir at um 10 ár eru allar festikonturnar farnar inn í eina felags pulju.

Endamálið við hesi felagskontu er, at hon skal koma øllum landbúnaðinum til góðar. Tað merkir, at søkjast kann um pening av kontuni til gransking, menning, royndarvirksemi og onnur tiltøk, sum koma øllum landbúnaðinum til góðar.

### Betri kunning um føroyingar og CTD í Danmark

Landslæknin hevur nú kunnað danska heilsustýrið um álvarsomu CTD-sjúkuna fyri at gera tað lættari hjá føroyingum í Danmark at verða kannaðir og viðgjørdir.

Tað sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Seinastu tíðina hevur nógv verið gjørt burtur úr at upplýsa føroyingar her heima í Føroyum um sjúkuna og tað eru eisini túsundtals føroyingar, sum higartil hava latið seg kannað.

Tað er bráðneyðugt, at tey, sum hava sjúkuna, koma í viðgerð við Carnetin við brestin, tí stórur vandi er fyri at doyggja brádliga á rættiliga ungum árum.

Men samstundis hevur verið fýlst á, at alt ov lítið er gjørt fyri at kanna føroyingar uttanlands og upplýst er um føroyingar, sum eru vendir í hurðini hjá lækna, tá ið teir hava biðið um eina CTD kanning, tí sjúkan er at kalla ókend uttanlands og læknarnir vita ikki, hvat fólk tosa um.

Men nú hevur so landslæknin skrivað danska heilsustýrinum skriv, har hann kunnar um sjúkuna.

Endamálið er at heilsustýrið so skal kunna læknar úti um landið í Danmark, so at teir vita, hvat málið snýr seg um og taka tað í álvara, tá ið føroyingar biðja um slíkar kanningar.

Annars er meiri at lesa á føroyskum og á donskum um CTD á heimasíðuni hjá heilsimálaráðnum, sum er á síggja á www.hmr.fo

# Umstríddur vegur ígjøgnum Leirvík má bíða eitt ár afturat

**Tað verður heldur ikki í ár, at farið verður undir at gera mest umstrídda vegastrekkið í landinum og tað er vegurin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Vegurin ígjøgnum Leirvík er útsettur enn einaferð og tað heldur Annika Olsen er flóvisligt fyri politisku skipanina*

Illa umstríddi vegurin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, verður heldur ikki gjørdur í ár.

Tað hevur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, staðfest í Løgtinginum.

Tórbjørn Jacobsen landsstýrismaðurin hevur spurt landsstýriskvinnuna, hvussu verður vorðið við hesum vegastrekkinum, ið hevur verið eitt stríðsmál nú í fleiri ár.

Annika Olsen staðfestir, at í lógini um skúlan eru 40 milliónir settar av til tunnilin, men at tað strekkir ikki til og tí ber heldur ikki til at fara undir tunnilin.

Tí verður neyðugt at løgtingið samtykkir nýggja lóg við hækkaðari játtan og ítøkiligari linjuføring.

Mett er, at projektið ígjøgnum Leirvík fer at kosta 50 milliónir, men landsstýriskvinnan roynir nú at prutta prísin longur niður.

Orsøkin til prísmetingina er, at játtanin skal eisini røkka til bátahyl og til at ognartaka lendi.

Samstundis er áður gjørt greitt, at samgongan fer ikki at koma við eykajáttanum í ár til útbyggingingar.

Men samgongan ætlar sær í næstum at gera eina langtíðarætlan fyri tær íløgur, sum skulu gerast hesi næstu árini og í hesi ætlanini fer hon at royna at fáa vegin ígjøgnum Leirvík raðfestan frammaliga.

Sjálv fer hon at virka fyri at peningur verður settur av á fíggjarlógini fyri næsta ár og hon vónar at politisk undirtøka verður fyri tí.